Úrslit av rennikappingini, Runt Agnið

Menn 10,5 km

Plás	Tið	Navn	Árg.	Felag/ Staður
1	40,04	Símun Joensen	1983	Klaksvík
2	40,10	Sigurð Justinussen	1967	Bragdið
3	40,40	Jonhard Larsen	1966	Treysti
4	41,40	Snorri Patursson	1979	Tórshavn
5	41,41	Cecil Weihe	1965	Bragdið
6	42,49	Samson Nesá	1972	Gøta
7	43,24	Olaf Olsen	1967	Roysnið
8	43,34	Óli Olsen	1949	Bragdið
9	44,07	Suni Jacobsen	1967	Bragdið
10	44,40	Trygvi Hansen	1966	Bragdið
11	44,54	Flemming Petersen	1960	Roysnið
12	45,52	Jóan Pauli Johansen	1972	Bragdið
13	46,33	Bogi Olsen	1974	Roysnið
14	47,37	Steintór Hjaltalin	1949	Bragdið
15	48,40	Jákup Alberg Berg	1963	Tórshavn
16	48,49	Ólavur Herup Olsen	1943	Bragdið
17	49,10	Petur Petersen	1960	Frederiksb.
18	49,20	Birgir Sondum	1961	Bragdið
19	49,24	Óla Jákup Kristoffersen	1959	Hoyvík
20	50,00	Robert Vilhelmsen	1951	Bragdið
21	51,47	Petur Dorian Petersen	1968	Tórshavn

Kvinnur 10,5 km

1	45,11	Rigmor N. Arge	1969	Bragdið
2	57,59	Ingrid Patursson	1958	Tórshavn
3	60,58	Brindis R. Weihe	1968	Bragdið

Gentur -7 (600 m)

1	5,24	Durita Skoradal	1996	Saltnes
2	5,30	Ingibjørg Petersen	1995	Tórshavn

Dreingir -7 (600 m)

1	3,20	Albert Róin Johannesen	1995	Æðuvík
2	3,23	John Viljam Johannesen	1995	Treysti
3	3,44	Regin Joensen	1995	Tórshavn
4	4,14	Páll R. Weihe	1995	Bragdið
5	4,53	Beinir Johannesen	1997	Treysti
6	5,28	Bjørn Bregendal	1996	Argir
	DNF	Steingrímur Hallsson	1997	Bragdið
	DNF	Betuel R. Hansen	1997	Roysnið

Gentur -10 (600 m)

1	3,14	Bjørg Seloy	1992	Argir
2	3,56	Vilbjørg Johannesen	1992	Treysti
3	4,05	Louisa Østerø	1993	Treysti
4	4,38	Erla Jacobsen	1993	Haralds.

Dreingir -10 (600 m)

1	2,50	Ari Johannesen	1992	Argir
2	2,54	Jógvan Ólavson	1992	Argir
3	2,59	Sigmund Olsen	1992	Hvannas.
4	3,09	Rúni Seloy	1994	Tórshavn

Gentur -13 (1600 m)

1	8,02	Christa R. Weihe	1991	Bragdið
2	9,00	Eyð Joensen	1991	Tórshavn

Dreingir -13 (1600 m)

1	5,56	Álvur F. Christiansen	1989	Treysti
2	5,57	Bárður Johannesen	1989	Argir
3	6,06	Rógvi S. Holm	1990	Argir
4	6,33	Jan Elmar Sørensen	1991	Treysti

Dreingir -17 (1600 m)

1	5,45	Jóan Karl Joensen	1987	Kollafj.
2	6,12	Martin Rói Vilhelmsen	1986	Tórshavn

Eitt umfar eftir

Triðja og næst seinasta umfarið av Daewoo Marathon kappingini varð runnið leygardagin, og nú er tað bert sjálv finalan á Kambsdali, sum er eftir at renna

RENNING
Jákup Mørk

Leygardagin varð skipað fyri árligu rennikappingini, Runt Agnið, sum samstundis var triðja umfarið í samlaðu Daewoo Marathon Cup kappingini. Hetta er kappingin, har luttakararnir til samans renna ein tein, sum svarar til eitt heilt marathon.

Eittarin er ikki við

Teinurin hjá teimum vaksnu var hesaferð 10,5 kilometrar, og aftur hesa ferð var tað Símun Joensen úr Klaksvík, sum varð fremstur. Símun er tó ikki við í samlaðu kappingini, tí hann tók ikki lut í fyrstu kappingini. Bert luttakarar, sum hava verið við allar kappingarnar kunnu teljast við í Daewoo kappingini.

Nummar tvey hjá monnunum gjørdist Sigurð Justinusssen, meðan samlaða eittarin, Jonhard Larsen gjørdist nummar trý.

Hjá kvinnunum vann Rigmor N. Arge, og er hon eisini klárt á odda í samlaðu støðuni. Aftan á hana komu ávíkavst Ingrid Patursson og Brindis R. Weihe.

Eisini runnu veteranar ella teir sonevndu masters, og her gjørdist Óli Olsen fremstur, meðan Steintór Hjaltalin og Ólavur Herup Olsen komu á næstu plássunum.

Eisini tey yngstu

Umstøðurnar at renna vóru kanska ikki av teimum bestu, nú veturin so spakuliga er um at troka seg fram, men kortini var undirtøkan heilt hampulig, og kappast varð í øllum aldursbólkum.

Hjá teimum 13 ára gomlu gjørdist Álvur F. Christiansen fremstur hjá dreingjunum, meðan Christa R. Weihe vann kappingina hjá gentunum.

Kappingina fyri dreingir 10 vann Ari Johannesen úr Æðuvík, og har varð tað Bjørg Seloy av Argjum, sum varð fremst. Og endiliga vann Albert Róin Johannesen kappingina hjá teimum yngstu dreingjunum, meðan Durita Skoradal av Saltnesi gjørdist vinnari hjá teimum yngstu gentunum.

Her á síðuni prenta vit øll úrslitini frá kappingini Runt Agnið.

Tjaldur vitjar aftur

Aðru ferð innan fýra dagar vitjar Tjaldur í høvuðsstaðnum, og hesa ferð er tað Kyndil, sum tekur ímóti

HONDBÓLTUR
Jákup Mørk

Setningurin hjá Kyndli undan dystunum móti Tjaldri mikukvøldið er sera einfaldur. Hjá bæði kvinnum og monnum tykist Kyndil nú aftur at vera eitt seriøst boð um eina endastøðu í oddinum, og tá Tjaldur væntandi fer at teljast millum niðaru liðini, eru tað bert tveir sigrar, sum kunnu góðtakast hjá Kyndli.

Tjaldur mutaði tó serliga í mansdystinum væl ímóti, tá teir um vikuskiftið vitjaðu Neistan. Undan hesum varð eisini boðað frá, at nú skuldi annað skil koma á hondbóltin í Runavíkini, og so er spurningurin, hvussu stór framgongdin verður frá dysti til dyst.

Hjá kvinnunum kann Kyndil við einum sigri leggja seg ájvant VB í oddinum á stigatalvuni, og hjá monnunum er stoðan ikki heilt ólík. Heilt fram í oddin koma teir tó ikki, men við einum sigri fylgja teir tó við hinum fýra ovastu liðunum, sum øll hava tapt ein dyst hvør.

Hondbóltsstøður

1. Deild kvinnur

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	VB	3	3 - 0 - 0	73	59	14	6
2	Neistin	4	2 - 1 - 1	84	75	9	5
3	Kyndil	3	2 - 0 - 1	81	69	12	4
4	VÍF	3	2 - 0 - 1	73	61	12	4
5	Stjørnan	4	1 - 1 - 2	80	85	-5	3
6	StÍF	3	1 - 0 - 2	74	86	-12	2
7	Tjaldur	4	0 - 0 - 4	75	105	-30	0

1. Deild menn

		dystir	v - j - t	vunnin mál	tapt mál	mál-munur	stig
1	StÍF	4	3 - 0 - 1	120	104	16	6
2	Neistin	4	3 - 0 - 1	107	99	8	6
3	VÍF	3	2 - 0 - 1	83	78	5	4
4	H71	3	2 - 0 - 1	71	70	1	4
5	Kyndil	2	1 - 0 - 1	52	53	-1	2
6	Tjaldur	3	0 - 0 - 3	78	91	-13	0
7	KÍF	3	0 - 0 - 3	60	76	-16	0

Flogbóltsstøðan

Meistaradeild, kvinnur

		d	v	-	t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1	Mjølnir	1	1	-	0	3	0	3	2
2	Dráttur	1	1	-	0	3	1	2	2
3	ÍF	1	1	-	0	3	2	1	2
4	TB	1	0	-	1	2	3	-1	0
5	Fleyr	1	0	-	1	1	3	-2	0
6	KÍF	1	0	-	1	0	3	-3	0

Meistaradeild, menn

		d	v	-	t	v sett	t sett	+/- sett	stig
1	SÍ	1	1	-	0	3	0	3	2
2	Mjølnir	1	1	-	0	3	1	2	2
3	ÍF	0	0	-	0	0	0	0	0
4	Fram	1	0	-	1	1	3	-2	0
5	Fleyr	1	0	-	1	0	3	-3	0

Flogbóltsúrslit:

Meistaradeild, kvinnur

Mjølnir-KÍF 3-0 (25-8, 25-15, 25-11)
ÍF-TB 3-2 (25-17, 25-20, 17-25, 25-27, 16-14)
Dráttur-Fleyr 3-1 (25-20, 25-15, 24-26, 25-21)

Meistaradeild, menn

Mjølnir-Fram 3-1 (23-25, 25-20, 25-20, 25-17)
SÍ-Fleyr 3-0 (25-19, 25-7, 25-16)

VIÐMERKINGAR

Løgmaður og fjalltíðin

Edmund Joensen

Nógv er brøytt síðan Jákup Frederik Øregård sáli frá formannsstólinum segði okkara landstyrismanning frá, at teir vóru uppsitarar hjá lógtinginum. Lógmaður og landstyrismenn fingu greitt at vita hvar skápið skuldi standa. Eingin yvir og ongin við síðuna av Lógtinginum.

Hóast vit hava fingið nyggja styrisskipan, sum á ávísum økjum gevur lógmanni meiri vald, so er tað sama galdandi, at lógmaður og landstyrismenn eru uppsitarar hjá lógtinginum og ikki øvugt.

Tað tikist sum lógmaður og landsstyrismenn hava gloymt at so er. Landstyrismennirnir kalla seg nú "ráðherrar" sjálvt um Styrskipan og Tingskipan siga greitt, at í Føroyum hava vit lógmann og landstyrismenn.

Vanalógmannsheitið er eisini innført sum standandi sjálvstøðugt heiti. Áður hevði vanalógmaður ongan áhuga uttan tá lógmaður ikki var í landinum ella hevði forfall. Hví hava okkara egnu nýtføroysku heiti og siðvenjur í landsumsitingini mist allan tydning? mugu vit spyrja.

Er hetta aftur eitt tekin um; at ongin er á brúmi og at hvør ger sum honum lystir.

Er nú nettiliga farið at mala fyri lógmanni ?

Í gjár helt eg meg hoyra og siggja yvir meg tá ið sagt og skrivað varð, at lógmaður kravur, at lógtingsformaðurin flytur figgjarlógarviðgerðina so hon ikki órógvar fjallgonguna og flettingina.

Sambært lógmanni liggur fjallgonga og tað at draga vil á Viðareiði á einum heygi mentunarstøði enn at vera á lógtingi og passa sítt arbeiði, meðan stórsta og tydningarmesta málið fyri føroyska samfelagið er til fyrstu viðgerð - sjálv lógtingsfiggjarlógin, sum styrir øllum samfelagnum.

Tað er nógv fyri at hoyra frá Føroya Lógmanni, at okkara aldargamla ting, sum sambært nýútkomnu sógu lógtingsins er besta boð uppá elsta ting í Evropa, liggur so miðaliga í føroyskari mentunarpið.

Nú á døgum varar fjalltíðin frá umleið miðkjalsmessu til einafer út í móti november. Eg nokti at trógva, at nakar annar føroyingur enn Føroya Lógmaður meinar í álvara at lógtingsformaðurin skal flyta viðgerðina av okkara figgjarlóg soleiðis at hon liggur aftan fyri fjalltíðina.

Styrislig sanadógin fyriskriva, at landstyrið skal leggja lógtingsfiggjarlógina fyri lógtingið áðenn fyrsta oktober. Meiningin við hesi áseting er, at hetta er síðsta freist hjá lógmanni at syrgja fyri, at hon er lógtinginum í hendi.

Onki forðar lógmanni at koma við figgjarlógini, áðenn fjalltíðin byrjar. Men figgjarlógin kemur ikki fyrrenn í síðstu lýtu og tá skal hon sjálvandi til viðgerðar sum skjótast. Lógmaður má vita, at siðvenja er at viðgerðin ikki byrjar fyrr enn nakrar dagar eftir at hon er framlagd. Lógtingsmenn skulu hava nakrar dagar til at seta seg inn í málið.

Lógin skal skjótast gjørligt í nevnd, soleiðis at tann stóra viðgerðin, sum fara skal fram í figgjarnevndini, og eftir núverandi skipan eisini skal fara fram í øllum nevndunum, kann fremjast í álvara.

Eitt er at figgjarlógin kemur til tingið í allarseinastu lýtu. Annað og verri er, at tað ikki sær út til at vera eitt liougt uppskot frá einum samdum landstyri, sum lógtingið hevur fingi til viðgerðar. So tað verður neyvan nakur lætt uppgáva at viðgera og samtykkja figgjarlógina. Eftir fyrstu viðgerð felkk ein ta fatan, at ein mestsum nyggj lógtingsfiggjarlóg skal gerast í figgjarnevndin. Orð sum kladda vóru sagð um uppskotið frá landsstyrinum.

Annars mugu vit vóna, at arbeiðið við figgjarlógini verður meira serpist í ár enn tað varð fjør, tá ið samanum kemur.

Seinasta ár var lógtingsfiggjarlógin fyri fyrstu ferð í sógunni endaliga samtykt av einum minniluta av samlaða lógtinginum, 15 fyri, 13 ímóti og 1 blonk . Hetta var onki at verða stoltur av. Hetta er varnerulig skomm fyri Føroya Lógting.

Serfróðsitetunin má verða á einum heygi støði, so samlaða lógtingi kann atkvæða fyri endaliga uppskotinum við 3. viðgerð, sum gjørt verður í øðrum londum við fólkaræði.

Spell at lógmaður, tá hann endiliga kemur á banan við egnum hugskotum, ikki hevur stóran hugflog og ikke er meira seriðsur enn hann var hesaferð.

Sjálvt um vit hava fingið nyggja styrisskipan, so eru øðrum hjá okkara gomlu politikkarum galdandi enn og eiga at verða tikin í tí álvara tey vóru spgd. Ongin yvir og ongin við síðuna av lógtinginum.

Orfeus-konsert í Vági sunnudagin

KONSERT
Tórbjørn

Á vetrarskránni hjá Orfeusi eru seks konsertir, og allar verða haldnar bæði í Norðurlandahúsinum og úti um landið. Fyrsta Orfeus-konsertin á bygd verður sunnudagin 27. oktober klokkan 15. Tá fara hjúnini Maria Malmsten og Einar Steinkopf at syngja og spæla í Stóra Pakkhúsi í Vági.

Maria og Einar eru fjølbroytt norsk tónlistarfólk, sum í vetur fara at starvast í Føroyum. Tey hava tikið útbúgving á Grieg-akademinum í Bergen, har tey umframt hóvuðsgreinir sínar lósu tónleikanámsfrøði. Maria og Einar hava starvað saman regluliga í 14 ár.

Maria Malmsten Steinkopf er messosopran. Seinastu árini hevur hon burturav virkað sum freelance-tónleikari. Hon hevur annars nýndir sum barnasangkona og kórleiðari. Ma. hevur hon saman við samspedagoginum Tutta Laukholm gjørt og framført fleiri søguligar leiksyningar.

Einar Steinkopf er virkin bæði sum solistur og sum kamartónleikari. Harumframt hevur hann útsett og umskrivað nógvan tónleik fyri nýdd og gittar. Fyri tveimum árum síðani kom út fløgan "Maria og de to andre", ein verkætlan í samstarvi við yrkjaran Truls Hovvei.

Orfeus-skráin hjá Maria og Einari fevnir um klassisk lóg fyri nýdd og gittara, renessansutónleik fyri sang og lutt, solo gittarverk og norskan og svenskan fólkatónleik, sum Einar hevur lagt til rættis.

Norðurlandahúsið hevur latið prenta faldara, sum greiðir frá ymsu konsertunum og øðrum tiltøkum, sum húsið skipar fyri kring landið.

www.sosialurin.fo
www.sosialurin.fo

hallo.fo
TILBOÐ !!
frá Hallo.fo
NOKIA 3510
1495,-
Tilboðið er bert galdandi til 31.10.02
(ella so leingi vøran er á goymslu)
NOKIA ERICSSON SIEMENS MOTOROLA
www.hallo.fo
.....far inn á www.hallo.fo ella ring tlf. 218-500
VISA